## Leivur um veðrið



Ein skuldi kanska trúð, at vit seldu mest, tá veðri er ringt, og fólk hava hug at sleppa vekk. Men tað er beint øvugt. Tá sólin skínur hava vit nógv meir at gera. Kanska fólk tá uppdaga, hvussu lekkurt tað er og ynskja sær meir.

## Ásla um at vera heimagangandi

Tá vit giftust vildi Leivur hava meg at vera heimagangandi, og tað helt eg eisini verða í fínasta ordan. Eg mótmælti ikki, men eg minnist, at eg hugsaði: Fari eg at halda út bara at ganga inni? Tá Steinvør var fimm ára gomul, spurdi Olivur Joensen, um eg kundi koma at hjálpa honum í Norðlýsinum. Eg bað hann spyrja Leivur, um eg kundi sleppa, sigur Ásla flennandi.



*- Tá høvdu vit hvørki fartelefon ella internet. Vit arbeiddu í døgndrift. Vit høvdu ikki ráð til annað. Vit fóru ongastaðni, tí tonk um onkur ringdi, meðan vit vóru burturstødd, sigur Ásla Fonn um tey fyrstu mongu árini í ferðavinnuni. Mynd: Høgni Thomsen*

um vit høvdu havt mat í munnin, um tað ikki var fyri ellisrentuna hjá mammu.

### Ongin ferðaðist

Í dag ferðast øll. Men soleiðis var ikki mitt í kreppuni.

- At ferðast niður á vikuskiftisferð ella til brúdleyp og konfirmatión var púra óhugsandi tá. Eingin hevði ráð at ferðast, minnist Ásla.

Hóast vánaligu umstøðurnar fingu tey støðugt fleiri viðskiftafólk. Serliga vóru tað mongu handverkarnir, sum ferðaðust niður at arbeiða, sum gjørdu mun.

- Men sjálvt um sølan gekk betri, so var vinningurin so lítil, at vit ikki høvdu ráð til løn, sigur Leivur Fonn. Vit hava havt sama bókhaldara øll árini, Sunnuvá Berg Jacobsen, og hon arbeiddi eisini fyri onga løn tey fyrstu árini.

- Vit høvdu prátað um at leiga hølir niðri í býnum, men vit høvdu ikki ráð. Vit hildu tí til í kjallaranum hjá svágrinum, Jógvan við Keldu. So ein dagin koyrdi eg Áslu og mammu hennara til Amaliu at keypa tógv. Eg veit ikki hví, men eg fór inn við. Amalia nevnir so júst tey hølini, sum vit høvdu prátað um, og spyr um vit høvdu hug at samstarva við hana, so hon kundi hava eina tógvdeild í okkara ferðaskrivstovu. Hetta var bønarsvar, og Ásla fekk nú løn í tvey ár.

- Tá høvdu vit hvørki fartelefon ella internet. Alt okkara sosiala lív varð sett í bíðistøðu, vit skiftust um at ganga til jarðarferðir, og um vit fóru á møti, máttu vit skunda okkum til arbeiðis aftaná.

### Supplera hvønn annan

Ásla og Leivur eru sera ymisk. Leivur er, sum Ásla útrykkir tað, rundur og behagiligur. Hann er lættur í sinni og hevur eina stilla, blíða medferð. Ásla er meira fýrakantað. Henni dámar, at skil er í, og hon sigur sum oftast sína erligu meining.

- Eg hevði aldri trúð, at vit kundu arbeiða saman, sigur Ásla. Men neyð lærir nakna kvinnu at spinna. Og tá vit stóðu í skuld upp um bæði oyru og vóru líka við at missa húsini, so høvdu vit onki val.

- Eg haldi vit arbeiða so væl saman, júst tí vit eru so ymisk, sigur Leivur. Ásla hevur sínar styrkir, og eg mínar.

Ásla flennir. – Eg hati at selja. Eg dugi